

www.oljan.fo

**Jan Müller** 04 - 11 - 2011

# Faroe Petroleum í uppskoti til heiðurslønir

Føroyska oljufelagið Faroe Petroleum, sum seinastu árini hevur verið í stórari menning og vaksið nógv um sítt virksemi og sum hevur 40 fólk í arbeiði í trimum londum, tykist nú eisini at heysta fruktirnar av sínum arbeiði, tá tað um viðurkenning ræður. Felagið telist eftir øllum at døma millum tey smærri børsskrásettu oljufeløgini, ið hava klárað seg væl og hevur oljustovnurin The Oil Council, sum á hvørjum ári letur heiðurslønir til tey oljufeløgini, ið hava staðið seg best, hesaferð skotið upp føroyska oljufelagið til ikki færri enn tvær av heiðurslønunum. Felagið er í uppskoti til heiðurløn fyri framúr góð avrik millum tey smærri børsskrásettu oljufeløgini, ið hava eitt virði niðanfyri 500 mill. pund. Felagið skal kappast við Cove Energy, Det Norske og Nautical Petroleum. Eisini er Faroe Petroleum í uppskoti sum ársins leitifelag. Hini í uppskoti eru Anadarko, Lundin Petroleum og Tullow Oil. Norska oljufelagið Statoil er kosið at kappast við trý onnur almenn oljufeløg at fáa heiðursløn fyri framúr góð avrik. Hini eru Ecopetrol, Petrobras og Petronas. (Tað skal viðmerkjast, at meðan hini feløgini burturav er almenn oljufeløg, er Statoil tað bara lutvíst, tí sum børsnoterað oljufelag eiga privatir íleggjarar ein part av hesum tí størsta felagnum í Norðurlondum, red.) Heiðurslønirnar verða handaðar í The Tower of London 17. november, har fyrrverandi stjórin í BP, The Lord Browne of Madingley, verður gestarøðari skriva fleiri oljuheimasíður á netinum. Mynd - Graham Stewart og Nils Sørensen. Myndatøka oljan.fo/Jan Müller